Løgtingið

Svar

uppá

skrivligan fyrispurning nr. SS-005/2020 til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Sirið Stenberg og Hervør Pálsdóttir, løgtingsmonnum, viðvíkjandi heilsustøðuni hjá ungum í Føroyum

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hevur landsstýrið ætlanir um at seta nøkur tiltøk í verk, sum kunnu bøta um heilsustøðuna hjá ungum ?

2. Hvørji átøk í sálarheilsuætlanini er ætlanin at seta í verk og nær?

3. Hvørji tiltøk kunnu vit rokna við verða sett í verk á heilsuøkinum, skúlaøkinum og á almannaøkinum ?

4. Nær kann roknast við, at øll tilmælini í ætlanini eru rokkin ?

5. Er ætlanin hjá landsstýrinum at gera meira við fyribyrging og heilsufremjan hjá ungum ? Um, ja, hvat og nær ?

Svar:

Til nr. 1

Ja, sum tað framgongur av svarunum niðanfyri verður tað á heilsuøkinum arbeitt við tiltøkum, sum kunnu bøta um heilsustøðuna hjá ungum.

Til nr. 2

Heilsumálaráðið arbeiðir støðugt við at fáa sett tey tilmæli í ætlanini í verk, sum ráðið varðar av.

Í samsvari við tilmælið í sálarheilsuætlanini hevur landsstýrismaðurin raðfest at fáa sett í verk eitt tilboð um ókeypis sálarfrøðiliga viðgerð til fólk, ið stríðast við lætt til moderat tunglyndi og angist. Talan er um eina trý ára royndarskipan til borgarar millum 15 og 35 ár.

Eisini hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at fáa styrkt um sálarfrøðiliga viðgerðina til málbólkin, sum er undir 15 ár. Tá ið talan er um børn og ung, yngri enn 15 ár, skal atlit takast til, at foreldur og avvarðandi fáa ein størri leiklut í viðgerðini. Eisini verður helst neyðugt, at eitt tílíkt tilboð gongur uppá tvørs av

geirum og stjórnarráðum. Landsstýrismaðurin hevur havt fund við umboð fyri teir stovnar, sum hann varðar av, fyri at umrøða málið og ætlar í næstum at taka málið upp við landsstýrismannin í mentamálum.

Eisini er skjøtul settur á arbeiðið at fáa skipa eitt slag av skaðastovufunktión til fólk, sum brádliga gerast álvarsliga illa fyri sálarliga. Sjúkrahúsverkið hevur fingið ein arbeiðssetning frá Heilsumálaráðnum, sum tekur støði í tilmælinum í sálarheilsuætlanini um, at læknavaktin 1870 eisini skal taka sær av teimum, sum brádliga gerast illa fyri sálarliga. Til tess krevst, at starvsfólk við neyðugum førleikum, at handfara sálarligar bráðstøður og at veita telefonráðgeving, verða knýtt at Læknavaktini.

Í sálarheilsuætlanini varð eisini mælt til, at sálarheilsa verður javnbjóðis partur av fólkaheilsuarbeiðinum. Fólkaheilsuráðið hevur seinnu árini varpað ljós á sálarliga heilsu og tiltøk at fremja sálarliga heilsu. Sum liður í arbeiðinum at upprøfesta arbeiðið við sálarligari heilsu, er manningin í Fólkaheilsuráðnum broytt. Ítøkiliga merkir hetta, at av teimum sjey ráðslimunum er ein sálarfrøðingur.

Í 2016 fór Fólkaheilsuráðið undir verkætlanina *ABC fyri sálarliga heilsu*. ABC fyri sálarliga heilsu er ein sálarliga heilsufremjandi ætlan, ið roynir at fáa einstaklingin at fara í gongd við at røkja og fremja sálarligu heilsuna hjá sær sjálvum og øðrum. Ein týðandi partur snýr seg eisini um at skapa karmar fyri trivnaðarfremjandi virksemi í samstarv við feløg, kommunur og stovnar. Við at vera virkin á ymiskan hátt, partur av einum felagsskapi og at gera ymiskt við fullum huga, ið gevur meining fyri einstaklingin, kunnu vit styrkja og bøta um okkara sálarligu heilsu.

Í samsvari við tilmælið í sálarheilsuætlanini eru ABC tiltøkini munandi víðkað og styrkt seinnu árini. ABC samstarvsfelagnir eru úr øllum landinum. Fólkaheilsuráðið hevur sett eitt verkætlanarfólk burturav at taka sær av ABC verkætlanini.

Til nr. 3

Tað er eitt stórt trýst á Barna- og ungdómspsykiatriina, og har tørvur er á útgreining, stuðli og hjálp til børn, ung og familjur teirra. Orsøkin til tørvin er ein óvanliga stór øking í ávísingum til útgreiningar. Í 2019 vóru 183 børn og ung ávíst – higartil í ár eru knapt 300.

Menningin á barnapsykiatriska økinum hevur verið sera stór seinastu 10-15 árini. Barna- og ungdómspsykiatriska toymið er vaksið úr næstan ongum til í dag at vera ein deild, sum veitir ambulantar viðgerðir til knapt 200 børn árliga.

Nýggj dagdeild varð eisini skipað í 2019, sum bjóðar intensiva miljøterapeutiskar eygleiðingar og viðgerðir. Nýggja tilboðið tekur broddin av tørvinum at leggja børn og ung inn á Psykiatriska seingjardeild og minkar um tørvin at senda børn og ung av landinum.

Tað hevur verið ein vaksandi trupulleiki við rúsevnum millum ung í Føroyum. Tí hevur landsstýrið gjørt av, at munadygg tiltøk skulu setast í verk, so vit fáa bast støðuni við hørðum rúsevnum millum ung.

Arbeiðið at økja um trivnaðin og basa happing millum næmingar í fólkaskúlanum er eitt øki, politiski myndugleikin raðfestur høgt. Seinastu árini eru ymisk átøk longu gjørd og fleiri eru í umbúna. Yvirskipað er málið at skapa góðar umstøður fyri næmingar og starvsfólk í føroyska fólkaskúlanum, soleiðis at tryggjað verður best møguligan trivnað og læring. 1. november í ár varð trivnaðarráðgevi settur í starv á

Nám. Arbeiðsuppgávurnar eru millum annað at samskipa, kanna og menna trivnaðarabeiðið í fólkaskúlanum. Ein liður í at menna økið er at hava neyv hagtøl. Tí hevur landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og mentamálaráðnum tikið avgerð um, at trivnaðarkanningar skulu gerast í fólkaskúlanum á hvørjum ári. Í fólkaskúlalógarbroytingini í 2018 varð ásett, at trivnaðarætlan skal vera ein av meginreglunum fyri virkseminum hjá skúlastýrinum. Trivnaðarætlanin er eitt týdningarmikið amboð til at skipa og málrætta arbeiðið við trivnað og menning, men umráðandi er, at trivnaðarætlanin er eitt arbeiðsskjal, sum verður umrøtt og nýtt í skúlanum.

Skúlaaftran er ein vaksandi avbjóðing í Føroyum eins og í londunum kring okkum. Ein arbeiðsbólkur, sum er sprottin úr arbeiðinum «Tann góða tilgongdin», er farin undir at lýsa støðuna og gera vegleiðandi mannagongdir fyri, hvussu vit kunnu hjálpa hesum vaksandi bólki av børnum og ungum. Arbeiðsbólkurin er mannaður við fólki úr Sernám. Hetta arbeiðið er ikki komið á mál, men verður vantandi liðugt á vári ella sumri 2021.

Á miðnámskúlaøkinum hevur verið og verður arbeitt við sálarheilsuni hjá teimum ungu. Sálarfrøði tænasta er sett á stovn og stigvíst víðkað. Atgongd til miðnám er víðkað við serflokkum og serbreytum. Júst nú hevur landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og mentamálaráðnum tikið stig til at seta ein arbeiðsbólk, sum skal koma við ítøkiligum uppskotum at bøta um sannlíkindi fyri, at ung við sálarligum og/ella sosialum avbjóðingum megna at fullføra miðnám. Væntandi fer hetta arbeiðið í gongd fyrst í komandi ári.

Vegleiðaraútbúgvingin hevur førleikament vegleiðingina í skúlunum sum heild.

Í mun til nógvu og ymisku tilmælini í heildarætlanini fyri sálarliga heilsu í Føroyum frá 2018, so er eisini talan um eina tilgongd, har Almannamálaráðið saman við Almannaverkinum, sjálvbodnum felagsskapum og sjálvsognarstovnum mið- og stigvíst arbeiða við at íverkseta tilmælini yvir tíð.

Almannaverkið, sjálvsognarstovnar og sjálvbodnir felagsskapir, sum fáa stuðul frá Almannamálaráðnum vísa á, at tað er ein avbjóðing at síggja, lofta og hjálpa ungum, sum hava sálarligar avbjóðingar av ymiskum slagi at dragast við.

Seinnu árini eru tað alsamt fleiri fólk við sálarligum avbjóðingum, sum hava tørv á hjálp, tænastum og bútilboðum frá Almannaverkinum, og tað eru eisini hesin málbólkurin, sum fyllir mest á bíðilistunum.

Tí hevur Almannamálaráðið seinnu árini í størri mun enn áður stuðla og viðvirka til, at fyribyrgjandi arbeiðið verður skipað og ment soleiðis, at fólk kunnu fáa hjálp fyrr og harvið møguliga sleppa undan at fáa tørv á umfatandi almennari hjálp.

Almannamálaráðið luttekur í átakinum SSP, sum við upplýsing og kunning til børn og foreldur, skal viðvirka til, at børn og ung fáa góðar lívsvanar. Stuðul er eisini latin til Barnabata, sum hevur sett í verk telefonráðgeving til børn og ung soleiðis, at hesi kunnu geva til kennar sína stúran, at tosa við onnur um støður, ið ávirka tey, samstundis sum tey fáa hjálp og vegleiðing, í hesum sambandi eisini í mun til sálarligar avbjóðingar. Harumframt hevur Almannamálaráðið í nøkur ár varpað ljós á harðskap í breiðasta týdningi fyri at basa harðskapi í nærsambondum, og stuðul verður eisini latin til Kris, sum hevur gjørt sítt

til at fólk eru vorðin tilvitaði um, hvat kynsligur ágangur er, og hvørjar avleiðingar eru av kynsligum ágangi.

Arbeitt verður eisini støðugt við at skapa karmar fyri betri og fjøltáttaðum tænastum, arbeiðsmøguleikum og bútilboðum til fólk, sum hava sálarligar avbjóðingar at dragast við.

Hetta er eitt áhaldandi arbeiðið, ið verður tillagað nýggjum støðum, sum stinga seg upp, og hetta er eitt arbeiðið, sum ikki hevur eina ávísa einfalda loysn.

Seinastu árini er orka løgd í at dagføra sosiallóggávuna, og 1. januar 2021 kemur lógin um almannatrygd og tænastur í gildi umframt ein rød av kunngerðum, sum áseta nærri reglar um ymiskar veitingar, endurbót og tænastur.

Lógin hevur eina rød av amboðum, sum Almannaverkið, sjálvsognarstovnar og sjálvbodnir felagsskapir kunnu brúka til at lofta, ráðgeva og hjálpa fólki, sum hava sálarligar avbjóðingar, og dentur verður lagdur á at stuðla fólki til størri sjálvbjargni og eitt virkið, støðugt og innihaldsríkt lív.

Tað stóra arbeiðið verður tó at íverkseta lógina og at tryggja fólki, sum hava tørv á tí, neyðuga hjálp.

Hetta er ein áhaldandi tilgongd, og tað fer at taka tíð at koma á mál.

Eitt av tilmælunum í heildarætlanini er at fáa til vega fleiri bústaðartilboð til fólk við sálarligum avbjóðingum.

Eitt av høvuðsmálunum hjá Almannamálaráðnum í løtuni er at fáa útvega fleiri bústaðir í kring Føroyar.

Miðað verður eftir, at fólk, sum hava sálarligar avbjóðingar av ymiskum slagi skulu inkluderast á vanliga bústaðamarknaðin, og at møguleiki skal vera at búgva í sjálvstøðugum bústaði við tí stuðli og hjálp, sum viðkomandi hevur

Arbeitt verður við eini bústaðarætlan, sum m.a. snýr seg sum at økja um og fjøltátta útboðið av bæði vanligum og vardum bústøðum kring landið.

Landsstýriskvinnan í almannamálum hevur lagt lógaruppskot fyri Løgtingið, sum heimilar Bústøðum at læna 450 mió. kr. at fíggja bústaðarbygging fyri.

Av teimum 450 mió. kr. eru 200 mió. kr. ætlaðar til serligar, almannagagnligar verkætlanir, eitt nú ein ella fleiri búfelagsskapir til persónar við sálarsjúku.

Sambært leigulógini hevur Almannaverkið ávísingarrætt til 5. hvørja íbúð hjá Bústøðum.

Íbúðirnar verða tillutaðar persónum, sum eru varandi skerdir, eitt nú orsakað av sálarsjúku. Talan er ikki um vardan bústað, men um eitt tilboð til persónar, sum vegna sínar avbjóðingar kunnu hava serliga trupult við at útvega sær egnan bústað.

Harumframt verður eisini arbeitt við eini ætlan at fara undir eitt alment-privat samstarv, har privatir veitarar útvega bústað, sum eitt nú fólk við sálarsjúku kunnu leiga, og at Almannaverkið veitir tænastuna til hvønn einstakan persón, sum hevur tørv á tí.

Tað eru tó eisini fólk, sum hava sálarligar avbjóðingar í so stóran mun, at tey hava tørv á einum vardum bústaði, har starvsfólk eru tøk alt ella stóran part av samdøgrinum. Hesi bútilboð eru skipað sambært forsorgarlógini.

Ein vardur bústaður kann vera ein varandi bústaður, sum er partur av einum búfelagsskapi ella einum sambýli.

Talan kann eisini vera um ein fyribils bústað, har dentur í størri mun verður lagdur á at greina støðuna hjá persóninum og við sosialpedagogiskari viðgerð at stuðla undir, at persónurin hóast avbjóðingar kann gerast sjálvbjargin og liva eitt sjálvstøðugt lív.

Harumframt verða eisini serlig bútilboð veitt persónum, sum ikki eru førir fyri at útvega sær ella fasthalda sær ein varandi bústað. Hesi bútilboð hýsa fólki, sum hava víðfevndar sosialar trupulleikar. Tað eru sjálvbodnir felagsskapirnar Blái Krossur, Frelsunarnarherurin og Soli deo Gloria, sum m.a. við stuðli á fíggjarlógini, reka serligu bútilboðini, sum í dag eru staðsett í Tórshavn og Klaksvík og eru skipaði við heimild í forsorgarlógini.

Landsstýriskvinnan í almannamálum er vitandi um, at bústaðarstøðan hjá fólki við sálarligum og sosialum avbjóðing ikki er nøktandi. Landsstýriskvinnan í almannamálum ásannar eisini, at arbeiðið við at fáa til vega fleiri bústaðartilboð er umfatandi og drúgt, og at hetta er ein uppgáva, sum fleiri mugu lofta, men metir, at við ætlanum sínum komandi árini á bústaðarøkinum, eru vit komin eitt stórt stig á leiðini.

Til nr. 4

Heilsumálaráðið arbeiðir sum nevnt støðugt við at fáa sett tilmæli í ætlanini í verk, men tað er torført at spáa um, nær øll tilmælini í ætlanini eru endaliga rokkin.

Til nr. 5

Kanningin "Hvussu hevur tú tað?", sum Fólkaheilsuráðið gjørdi í 2019, vísir, at fleiri – eisini ung – siga seg hava eina ringa sálarliga heilsustøðu. Kanningin vísir eisini, at tá tað kemur til heilsuvanar, er rúm fyri batum á fleiri økjum, serliga tá tað kemur til vekt, rørslu og royking. Við støði í hesi kanningini ætlar landsstýrið at fara undir at gera eina nýggja og dagførda fólkaheilsuheildarætlan, sum tekur atlit til at fremja bæði sálarliga og likamliga heilsu hjá føroyingum. Eitt slíkt arbeiðið er fjøltáttað og fevnir um allar lutir í samfelagnum, og tí fer hetta arbeiðið at verða gjørt í tøttum samskifti við allar viðkomandi partar. Ætlanin er at gera eina fólkaheilsuheildarætlan, sum fevnir um tíðarskeiðið 2021-2030.

Í Tinganesi, 18. desember 2020

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður